ítróttur

Nr. 243 • leygardagur • 16. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Oddurin hjá kvinnuni fer í tvíningar

Nicolina og hinar úr VÍF sleppa rættliga at royna seg, tá Stjørnan kemur á vitjan sunnudagin

Seinasta umfari› undan jólaste›ginum ver›ur leikt um vikuskifti›, og skulu til samans seks dystir avgrei›ast. Teirra millum er oddabraki› hjá kvinnunum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Me›an menninir vi› hesum dystum enda sítt grundspæl, ver›a kvinnurnar ikki lidnar vi› grundspæli› fyrr enn í januar mána›i. Hetta tí kvinnurnar vegna landsdystirnar móti Svøríki ikki hava havt møguleika at avgrei›a eins nógvar dystir.

Toppdystur í Vestmanna

Uttan iva tykist mest áhugaverdi dysturin hjá kvinnunum hetta vikuskifti› at ver›a í Vestmanna, har tey bæ›i oddali›ini, VÍF og Stjørnan bresta saman.

Undantiki› sínámillum javnleikin í Klaksvík, hava bæ›i li›ini vunni› allar sínar dystir, og í summum førum hevur munurin í dystunum veri› nærum ræ›andi.

Hóast FM-heiti› ikki stendur og fellur vi› hesum eina dystinum, so er líti› at ivast í, at vinnarin av dystinum samstundis ver›ur li›i›, sum fer vi› flest stigum í endaspæli›. Hetta hóast Stjørnan eisini í seinasta dystinum í grundspælinum hevur ein sera truplan dyst í Vági.

Umframt toppdystin í Vestmana, eru eisini tveir a›rir dystir á skránni um vikuskifti›. Á Giljanesi tekur Sóljan móti Neistanum, og í Runavík kemur Kyndil á vitjan hjá Tjaldri.

Útili›ini mugu metast sum favorittar í hesum dystum, og skulu tey framhaldandi royna at renna eftir VB, er heldur einki at ivast í, at ta› er ney›ugt vi› stigum í hesum dystum.

Kyndil má strí›ast

Hjá monnum er aftur hesu fer› talan um eina lokaluppger›, og aftur er Neistin annar parturin í hesari.

Lokaluppger›irnar í høvu›ssta›num gerast alsamt fleiri í tali, og hesu fer› er ta› móti H71, at Neistin skal royna seg.

Fyrra dystin li›anna millum vunnu hoyvíkingar, og skulu teir gera álvara av ætlanunum um at enda í ovaru hálvu, er helst ney›ugt vi› einum sigri í hesum dystinum.

Úrtøkan hjá hoyvíkingum hevur tó ikki veri› hin besta seinastu dystirnar, me›an Neistin, hóast tapi› fyri Kyndli, sær út til at hava fingi› gli› á. Undir øllum umstø›um eru útlitini fyri einum spennandi dysti í høllini á Hálsi sunnudagin.

Hitt havnarli›i›, Kyndil, fer til Runavíkar at royna seg, og teir mugu greitt tola at ver›a róptir favorittar í hesum dystinum.

Nøkur løtt uppgáva fer ta› tó ikki at vera talan um hjá teimum. Tjaldur hevur toga› seg upp eftir í mun til í fjør, og saman vi› framgongdini, eru áskо›ararnir eisini farnir at fjølgast í høllini, so einki er at ivast í, at Kyndil má strí›ast fyri sigrinum.

Seinasti dysturin á kappingarskipanini fyri jól er lokaluppger›in í Vestmanna, har kollfir›ingar koma á vitjan. Hetta ver›ur samstundis seinasti dystur hjá kollfir›ingum undan samanleggingini, og møguliga kann hetta hava sálarligan t‡dning hjá teimum.

Um hetta er nóg miki› til at gera naka› vi› vestmenningar er tó sera ivasamt. Eftir javnleikin móti Kyndli er líkt til, at VÍF aftur hevur funni› fótafesti›, og vinna teir dystin sunnudagin, er talan hóast alt um fult stigatal fyri endaspæli›, og ta› man nú ikki vera so gali›, sum tey siga í Kollafir›i.

VÍF-Tjaldur 38-22 (17-12)

VÍF heldur fram

Stigamissurin fyri Kyndli tykist ikki nerta vi› sjálvsáliti› hjá vestmenningum, sum hóskvøldi› trumla›u Tjaldur til viks

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Ein dystur var› leiktur í bestu mansdeildini hóskvøldi›, tá Tjaldur vitja›i oddali›i› í Vestmanna.

Einki er at ivast í, at heimaásko›ararnir vænta›u ein sigur av li›num, og menninir á vøllinum lótu ikki naka› vónbrot frá sær í so máta.

Avgjørdu alt fyri eitt

Vestmenningar løgdu beinan vegin har›liga fyri, og vunnu sær skjótt eina hampuliga lei›slu, og so kom Tjaldur í roynd og veru onganti› nærri nøkrum stigi.

Tá munurin var minstur, var talan um tr‡ mál, og eftir at VÍF byrja›i seinna hálvleik vi› at skjóta seks á ra›, var leyst og li›ugt. VÍF hev›i tá 23 mál, og somiki› nógv fekk Tjaldur ikki tilsamans í dystinum.

Vi› sigrinum hildu vestmenningar fast um, at javnleikur móti Kyndli var at kalla ókeypis, solei›is at teir, tá stigini eru hálvb‡tt, kunnu fara í vetrarfrí vi› fullum stigatali.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 9(2), Ingi Olsen 6, Sámal Joensen 5, Johnny Joensen 5, Sjúr›ur Holm 4, Agnar Joensen 3, Martin Hummeland 3, Petur Fr. Joensen 2, Eli Müller 1
Tjaldur: Jens Martin Knudsen 6(2), Zoran Sarcevic 6(4), Mortan Hansen 3, Sveinur í Hei›unum 2, Arnfinn Langgaard 2, Dánial H. Kjærbo 1
Brotskøst: VÍF 3, Tjaldur 7
Útvísingar: VÍF 6, Tjaldur 7
Diskvalifikatiónir: Tjaldur 1 (3x2 minuttir)
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Kristian Martin Skála

Seinasta leikumfar fyri jól

Hetta vikuskifti› ver›a seinastu dystirnir í flogbóltskappingini fyri jól. Bara meistaradeildin spælir hetta vikuskifti›, hinar deildirnar eru longu farnar í jólafrí.

FLOGBÓLTUR
tí›indaskriv

Meistaradeild menn

Dystirnir eru hesir:
Leygardagur 16. des.
Kambsdalur
ÍF–Fram kl. 15.00
Leygardagur 16. des.
Gundadalshøllin
Fleyr–Mjølnir kl. 15.00

Sera spennandi leikumfar hetta vikuskifti›. Á Kambsdali skulu ÍF og Fram royna at fylgja vi› Mjølni. Hjá bá›um hesum li›unum er av alstórum t‡dningi at vinna. Fram er á veg úr aldudalinum eftir at hava tapt tríggjar dystir á ra› vunnu teir endiliga aftur seinasa dyst. ÍF hevur tapt tveir teir seinastu dystirnar, so bæ›i li›ini eru eitt sindur vi›brekin. Fyrri dysturin millum hesi li›ini var í Havn, og tá vann ÍF 3- 1.

Oddali›i› Mjølnir skal í Havn royna at tryggja oddastø›una. Ta› kunnu teir gera, vinna teir á Fleyr. Mjølnir er 4 stig fammanfyri hini li›ini, sum er, men Fleyr er um at finna spæli›, sum gjørdi teir til føroyameistarar seinasta kappingarár, fram aftur. Seinast var ta› ÍF, sum fekk at føla, at Fleyr vil vera vi› í oddastrí›num aftur í ár, og ta› kann meira enn so henda, at Mjølnir eisini fær ta› trupult í Gundadalshøllini leygardagin. Fleyr er í tí stø›u, at dysturin skal vinnast, um gloppi› upp til Mjølnir ikki skal gerast ov stórt. Mjølnir kann tapa og framvegis vera oddali›, men sigurin er tó eisini sera t‡dningarmikil hjá teimum.

Meistaradeild kvinnur

Dystirnir eru hesir
Leygardagur 16. des.
Kambsdalur
ÍF–TB kl. 13.00
Leygardagur 16. des.
Gundadalshøllin
Fleyr–Mjølnir kl. 13.00

Í strí›num um 3. plássi› skulu ÍF og TB dystast á Kambsdali leygardagin. Kappingin hjá kvinnunum er farin í tvey, tí Dráttur og Mjølnir hava lagt seg naka› fram um hini li›ini. Henda dystin er torført at meta um, tí bæ›i li›ini spæla ógvuliga ójavnt. ÍF hevur seinastu dystirnar ikki megna› at spælt naka› serligt, men hjá TB var stórspæli› frammi ímóti Drátti seinasta dyst. Ta› rakk tó ikki til sigur, men TB tykist at vera betur fyri sum er. ÍF hevur fyrimunin av heimavølli, og ta› kann gerast munurin, tí TB hevur trupulleikar á útivølli.

Fleyr fær aftur hetta umfari› møguleikan at arga anna› toppli›i›. Hesafer› er ta› Mjølnir, sum í klassikaranum skal til Havar at spæla. Fleyr og Mjølnir eru einastu li›ini, sum hava vunni› meistardeildina, og dystir millum hesi li›ini eru altí› naka› serligt. Mjølnir hevur seinastu árini sta›i› seg betur enn Fleyr, men hóast ta› hevur Fleyr altí› av og á megna› at vunni› onkran dysti á Mjølni. Um ta› eydnast hesafer› er ivasamt, tí Mjølnir spælir trygt og væl. Fleyr kann eisini spæla væl, men sum skilliga sást í dystinum ímóti Drátti seinasta sunnudag, so megnar Fleyr ikki rættiliga at fylgja vi›, tá i› mest umræ›ur. Mjølnir er tí grei›ur favorittur til henda dystin.

Vikuskifti

Nr. 243 • leygardagur • 16. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Kinna Poulsen:
Ivin heldur lív í listini
sí›a 20-21

FØ‹INGARDAGSHEILSAN. Mánadagin fyllir n‡skaparin og uppreistrarma›urin í føroyskari list - Ingálvur av Reyni - áttati ár. Frams‡ningin, sum enn er at síggja í Listaskálanum, er óiva› ein tann besta og sterkasta frams‡ningin, sum nakar einstakur føroyskur listama›ur hevur havt



Meistarin áttati

Jóhann Mortensen

At trína inn í Listaskálan leygardagin tann 25. November var sum at koma inn í eina frams‡ningarhøli í útlondum vi› altjó›a list. Frams‡ningin bar ikki dám av, at hesin skálin liggur fjart úti í Nor›urhøvum. Heldur ikki bóru listarverkini dám av, at listarma›urin stundar ímóti teimum áttati.

Men mánadagin fyllir n‡skaparin og uppreistrarma›urin í føroyskari list – Ingálvur av Reyni – áttati ár. Frams‡ningin, sum enn er at síggja í Listaskálanum, er óiva› ein tann besta og sterkasta frams‡ningin, sum nakar einstakur føroyskur listama›ur hevur havt.

Ingálvur stendur á listarliga tindinum. Hevur gingi› gjøgnum lí›ir, skursl og hamrar. Í toku og sól. Og nú – sólin er vi› at koma vestur um – sko›ar hann í kring og letur hugin reika. Hugflogi› hevur ikki veri› størri enn ta› sama. Ta› vísa verkini á hvítu bróstunum, og heitini á málningum og vatnlitsmyndum siga ta› eisini. Allar myndirnar bera dám av d‡pd í innihaldi.

Harafturat hevur tann stóra fjøldin gó›tiki› list hansara. Ta› sóu vit henda seinrapartin, tá dyrnar lótu upp. Fólk tustu inn. Fleiri enn á eini ólavsøkuframs‡ning. Vit skulu ikki so nógv ár aftur í tí›ina, tá vit hoyrdu fólk spyrja, - Hví málar Ingálvur ikki sum fyrr – sum í hálvttr‡ssunum? Tá hús vóru hús, og fjøll vóru fjøll. Og tá fólk vóru fólk.

Men nú kunnu vit kunnu uttan at ivast siga, at hann av álvara hevur fingi› fólksins vi›urkenning.

Gott var, at hann slepti tí meiri stílfulla og naturalistiska málninginum. Hev›i Ingálvur veri› ein so spennandi og so høgt mettur listarma›ur, um hann framvegis mála›i myndir av Tinganesi, Niels Finsensgøtu ella Porkeri, sum vit øll kendu aftur? Neyvan.

Tá ta› er sagt, skal eisini sigast, at ta› er ikki so lættgongt inn listaver› Ingálvs. Nógv torga›u slettis ikki inn í henda heimin, tí har eru bæ›i stíggir og skor›ar at fara um, men nú koma alt fleiri inn í hetta listarliga bjargalendi›. Har síggja vit stór listarlig vir›i. Og vit finna eina javnvág, sum er so t‡›andi í okkara fer›miklu tí›.

Gondin í listini hjá Ingálvi vísir, at hann hevur veri› djarvur og n‡skapandi. Hann var ein tann fyrsti føroyski listamálarin, sum abstrahera›i frá tí meiri naturalistiska málninginum, hóast motivini framvegis hóma›ust. Og ta› var ikki lætt hjá einum leitandi listamanni í teimum kørgu fimmti- og sekstiárunum, tá nærum eingin hev›i møguleika at ogna sær ein málning. Men hann hev›i ta ney›ugu styrkina og dirvi›.

Var íblásturin ikki nóg stórur her í oyggjunum, gekk lei›in í onnur lond. Helst til høvu›ssta› listarinnar, París. Har kundi hann síggja verk hjá listarligu skyldmonnunum frá aldarskiftinum, Braque ella Cézanne. Og hagar gongur lei›in enn.

Málningalistin hjá Ingálvi er høgt í metum í øllum Nor›urlondum. Men teknilistin stendur ikki aftanfyri. Hann er millum teir allar fresmtu teknararnar, men hesin parturin av list Ingálvs er neyvan so kendur uttan fyri landoddarnar. Tíverri. Bæ›i tann fría og einfalda strikan frá teimum seinru árunum og tær meira føstu tekningarnar frá fimti- og sekstiárunum skara framúr. Fólkal‡singarnar og andlitsmyndirnar. Ella tak tekningarnar í bókini Tann Deiliga Havn! Tekna›i hann seg ikki vi› hesum tekningunum úr gomlu Havnini inn í hjørtuni á okkum havnarfólkum?

Hvør er so hesin listama›urin, hesin erligi listama›urin? Sum, um ta› at mála hevur sagt, at tú mást vera sannur. Og sum sigur, at tú mást hava uppliva› ta›, tú ger. Jú, hann er havnarma›ur. Føddur og uppvaksin í Havnini, og tí›um møta vit listamanninum av Ingutrø› í Havnargøtum. Til gongu. Heilsar fryntligur, lyftir kollinum á. Til vinstru og høgru. Fer ví›ari, og prátar kanska vi› tann næsta, hann møtir. Solei›is síggja vit hann og solei›is kenna vit hann.

Vinsælur og fyrikomandi. Lítillátin og sjálvatfinningarsamur. Ja, ta› hevur helst veri› treytin fyri at koma á tindin. - Men hvussu kann hesin spakføri ma›urin taka seg upp sum eitt listarligt óløgi í litum og strikum, henda- og handaveg, í rey›um, gráum og svørtum? Ella leggja seg aftur í fri›sælum gráum, gulum og grønum stø›uhyljum. Ein gáta.

Gó›i Ingálvur! Vit eru mong, sum tú hevur hugtiki› og sum tú hugtekur. Sum hava havt spennandi løtur, tá vit eru farin á fer› í listaver› tína. Hava leita› og funni›. Ella kanska ikki funni›, men eru vend aftur. Og venda aftur fyri at njóta hesi verk, hesar kompositiónir og litir. Á frams‡ningum, á stovnum ella í bókum. Heilgjørt og orginalt. Ja, eisini frams‡ningarskráirnar eru orginalar. Vit gle›ast um ta›, tú skapar, tí hugskygdar skapanargávur eigur tú.

Hjartaliga tillukku!